gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Exit Torbjørn – lagnunar speisemi!

Tað kann neyvan kallast annanð enn lagnunar speisemi, at Torbjørn Jacobsen legði frá sær í gjár, ella varð kroystur at leggja frá sær, tí hann dugur ikki hógv.

Allarhelst noyddi Tjóðveldisflokkurin ella løgmaður hann at leggja frá sær. Tað var tað sama, sum hendi undangongumanni hansara, Signari á Brúnni. Tá var Torbjørn Jacobsen millum teir fremstu at fáa Signar á Brúnni frá. Tey flestu minnast greinina á breddanum í Dimmalætting, tá nú fyrrverandi landsstýrismaðurin við stórum orðum segði, at hevði Signar gjørt nakað skeivt, ella brotið lógina, mátti hann frá sum landsstýrismaður.

Tað fór av álvara at brima undir landsstýrismanninum, tá hann í síðstu viku einaferð enn avdúkaði, at hann var ikki búgvin at vera landsstýrismaður. Ístaðin fyri sakliga at viðgera trupulleikan hjá Vestmanna skúla og øðrum skúlum fór hann at kalla og rópa. Um hann hevði rætt ella ikki, er líka mikið. Slíkt eigur ein landsstýrismaður ikki at gera, hóast hann sjálvandi kann hugsa tað, hann segði.

Framferðin hjá Torbirni setti formannin í flokkinum, Høgna Hoydal, í eina løgna støðu, bæði lætta og torføra. Lætta, tí tá Torbjørn skírdi løgmann fyri ein danska leigusvein, boðaði Tjóðveldisflokkurin í tíðindaskrivi frá, at endurtók slíkt seg, skuldi tað fáa avleiðingar. Og tað fekk tað. Hinvegin er støðan hjá formanninum eisini torfør, tí nú noyddist hann at senda ein av svornu viðhaldsmonnunum í ætlanini at “stovnseta republikkina Føroyar” til hús, tí hann er ikki búgvin til politiskt arbeiði í tí gjøgnumskygda fólkaræðinum.

Harafturat er formaðurin og Tjóðveldisflokkurin komin í eina komiska støðu: Tá tann harða kjarnan í flokkinum noyddi Signar á Brúnni at leggja frá sær “fyribils”, sum sagt varð, bedýraði nýskaparin í flokkinum, at hevði Signar einki skeivt gjørt, skuldi hann setast aftur sum landsstýrismaður. Frágreiðingin um framferðina hjá Signari í sjónvarpsmálinum hevði ta greiðu niðurstøðu, at einki óregluligt var farið fram. Men tá hevði flokkurin – kanska í skundi – sett Torbjørn í landsstýrissessin! Er flokkurin nú noyddur at halda orð og fara ta tungu gongd eftir Signari, so viðhaldsmaðurin Torbjørn kann koma á ting aftur sum varamaður hjá Signari?

Hóast Torbjørn Jacobsen hevur gjørt hol í sjógvin í onkrum máli – t.d. at leggja eina útbúgving út á bygd – fara neyvan aðrir politiskir varðar at standa eftir hann. Hann er litríkur, sum løgmaður segði um nú fyrrverandi starvsfelagan í landsstýrinum, og dugur væl ar málbera seg í skrift. Men fólk fara óivað at minnast hann sum landsstýrismannin, sum ikki dugdi hógv, og at hetta var hansara bani. Men hann fær kanska aftur ein møguleika, tá “republikkin er stovnsett” og tann harða kjarnan hevur fingið buktina og báðar endarnar! Livst so spyrst!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kulturur – ???

**Hanna Lisberg**
*Tórshavn, 28.05.01*



Eg eigi eitt føroyskt bundnaturriklæði (dupult), sum ein gomul kona úr Gøtu bant! Hon var elligomul tá, uppi í hálvfemsunum. Vakurt var tað og er tað, mjúkt og lætt og heitt; fyri mær er tað eitt tað vakrasta listaverk.

Tað er ógvuliga ymiskt, hvat vit meta list at vera.

**Kulturur!**

Hvat er kulturur?

Eg spyrji bara. Vit høvdu høvi at síggja fleiri hundrað pør í føroyskum klæðum í Havn – menn og kvinnur – glað og fró. Var hetta kulturur? Ja, so sanniliga. Vøkur sjón.

Men tá eg sigi tykkum, at politikarar okkara bert rokna hetta kultur at vera, tá teir uppskrýddir vísa seg í føroyskum klæðum og gera seg herðabreiðar. Her heldur kultururin uppat.

Hví sigi eg tað?

Jú! Tey, sum virkað hava, mugu gjalda 25% í MVG – ella rættari tann, sum keyir hesa tænastu. Er tað tí, at tað, sum hesar hendur hava virkað, ikki verður virðismett – og roknað sum »ikki kulturur«?

Rættir menn, ha?

At veva – at binda – at toltra – at bregda o.s.fr. – kulturur? Syndast ikki!

Eg tosi ikki um grýtulappar, men tjóðarbúnan.

Takk fái skúlarnir fyri tað fjølbroytta handaverk, ið har fer fram.

Sjálvt seti eg ómetaligan prís uppá tað, sum Johanna Jensen, Kvívík – Ása dóttir hennara og Elinborg Petersen lærdu meg, tá eg virkaði mín egna búna, tá eg gekk í skúla. Væl veri teimum og øllum teim fyri, sum hava lært og læra næmingar hetta dýrabara – at duga at brúka hendurnar. Tað eigur at verða virðismett! Ongantíð ov høgt.

**Grýtulappar**

Eg hoyrdi einaferð tveir menn skeldast! Annar sigur: »Heldur tú ikki kjaft, skal eg rista punthenkur í eygnalokini á tær!« Hetta var áðrenn dreingir lærdu at binda grýtulappar! Syndast ikki.

Eykasýningar:

# Speedy Gonzales setur ferð á



TÍÐINDASKRIV

Eykasýningar verða av leikinum SPEEDY GONZALES SETUR FERÐ Á sunnudagin 3. juni og mánadagin 4. juni, báar dagarnar kl 16:00.

Sýningarnar sum hava verið eru ógvuliga væl vitjaðar og leikt hevur verið fyri skúlum eisini.

Leikurin snýr seg um misnýtslu av narkotika og hvussu hesi ungu fólkini sjálvi royna at sleppa burturúr haftinum.

Leikararnir siga frá hvør sínari lívssøgu, og ein sær í flash back'um hvussu lív teirra var áðrenn tey hittust og blivu vinir.

Leikurin varar ein góðan tíma.

Tað eru 12 ung í aldrinum 14 til 16 ár frá Barnasjónleikarfelagnum Dramaverkstaðnum og Kvøld og Ungdómsskúlanum sum manna bólkin sum framførður leikin SPEEDY GONZALES SETUR FERÐ Á.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Svanasongurin hjá teimum seinastu idealistunum í føroyska fólkaskúlanum

**Martin Eidesgaard**
*skúlastjóri á Tvøroyri*



**Viðmerking til rokið, sum hevur verið av einum tíðindafundi í Vestmanna skúli.**

Tá vit lesa og hoyra reaktiónina hjá Landsstýrismanninum í mentamálum aftaná ein tíðindafund, sum Vestmanna skúli skipaði fyri, má ein spyrja seg sjálvan. Er hetta svanasongurin hjá seinastu idealistunum í føroyska fólkaskúlanum?

Eg eri heilt greiður yvir, at eg, tá hugsað verður um ættarbondini til ávísan politikkara, við at úttala meg alment um hesi viðurskifti, kann ákærast fyri bæði líkt og ólíkt. Men so longi tað ikki fær avleiðingar fyri mítt arbeiðspláss, sum er Tvøroyrar skúli, so er tað at liva við.

Eisini vit á Tvøroyri hoyra til tann bólkin av skúlum, sum vegna ójavnar árgangir av næmingum, eru komnir í eina støðu, har vit ikki eru før fyri at geva næmingunum eitt nøktandi undirvísingartilboð. Vit hava yvirlivað 3 tey seinastu árini, tí vit hava fingið eykajáttan.

Eg haldi tað var Landsstýrismaðurin sjálvur, sum fanst at Vestmanna skúla, tí hesin var tann einasti, sum gjørdi um seg, tí hann hevði fingið ov fáar tímar.

Veruleikin er tann, at so gott sum allar atfinningarsamar og konstruktivar røddir so líðandi eru tagnaðar, tí hesar hava ásannað, at her gerst onki. Tú kemur ikki ígjøgnum við atfinningum. Tað er líkamikið, hvussu saklig ella væl undirbygd tíni sjónarmið eru. Ongin tekur støðu til, um tú hevur rætt ella órætt.

Tí hevur Landstýrismaðurin heilt misskilt leiðsluna í skúlanum í Vestmanna. Í veruleikanum er tíðindafundurin eitt neyðarróp. Eitt neyðarróp frá teimum seinastu idealistunum í føroyska fólkaskúlanum. Tey vónaðu, at onkur vaknaði. Tey vóru enntá so bláoygd, at tey trúðu, at nú fór at hjálpa. Vit onnur skammast, tí vit hava uppgivið, vit hava mist trúnna upp á, at tað nyttar at fara á barrikadurnar. Vit hava ásannað, at vit koma ikki ígjøgnum ”systemið”, tí ”systemið” hevur als ongan áhuga í okkara grundgevingum.

Í veruleikanum snýr misnøgdin við tímabýtið seg eisini um, at vit her í Føroyum eru við at fáa tvey sløg av skúlum. Fyrsta floks skúlar, sum, í hvussu so er higartil, hava havt møguleikan at bjóða sínum næmingun fjøllbroytt tilboð í framhaldsdeildini og sum hava havt ráð til at seta nógva orku av til fyrstu skúlaárini. Og so annan floks skúlar, sum eru so illa fyri, at teir ikki eru førir fyri at liva upp til krøvini í fólkaskúlalógini. Ferð eftir ferð hava skúlaleiðarar gjørt vart við vandan við hesari gongdini. Men ongin vil ella torir at gera nakað. Møguliga er okkurt spinnandi galið við sjálvari skúlalógini. Lógin er jú ein donsk lóg, sum bert er umsett. Hon er møguliga ikki hóskandi til eitt samfelag, sum tað føroyska.

Í dag er støðan hjá flestu skúlunum tann, at teir ikki veruliga vita, hvat teir hava at húsast við næsta skúlaár, tí ongin hevur enn fingið brævið við undirskriftini á. Ja, so langt úti eru vit nú, at vit stóla bert upp á upplýsingar tá teir koma í brævi við undirskrift á.

Hvat endin verður av hesari gongdini, sum føroyska skúlaverkið er í, veit eg ikki. Eg trúgvi tó, at tey í Vestmanna skúla eru á rættari leið. Tey einastu, ið kunnu hjálpa skúlaverkinum á føtur aftur, eru foreldrini. So ein gongd leið er at fáa foreldrini meira aktiv. Tað er hóast alt teirra børn, sum ikki fáa ta undirvísing, tey hava krav uppá, sambært landsins lógum.

Landsstýrismaðurin kann tó ugga seg við, at tað møguliga gongur rúm tíð áðrenn nakar hættir sær at mótmæla aftur. Hinvegin kann hann heldur ikki rokna við nøkrum konstruktivum kjaki við leiðslurnar á skúlunum, um tað skuldi hent, at hann kom við nýggjum tonkum á skúlapolitiska økinum. Vit skulu fyrst læra okkum henda nýggja samskiftisháttin, sum Landsstýrismaðurin hevur innført.

# Viðmerking til grein í Sosialinum

**hósdagin 31.05.01 um bræv frá Miðvágs-Sandavágs skúla til MMS og skúlanevndina á staðnum um munnligu próvtøkurnar í summar**

Fríggjadagin 25.05.01 sendu vit eitt bræv til avvarðandi skúlamyndleika, t.v.s. skúlanevnd og Mentamálastýrið, har vit vístu á, at vit harmaðust støðuna, sum næmingar okkara, sum skuldu til munnliga próvtøku, vóru í, um ikki skjótt endi kom á verkfallinum. Grundgevingarnar vóru, at serliga næmingar í 9. flokki høvdu ikki havt vanliga undirvísing í fleiri vikur orsakað av, at páskafrí, verkætlanaruppgávan, starvsvenjingin, skrivliga próvtøkan, og oman á alt verkfallið, rann saman, og tí høvdu lærararnir trupult við at náa tann setning, sum teir sambært krøvum og ársætlanum høvdu sett sær fyri.

Brævið varð lagt út á ráðstevnuna hjá lærarum í fólkaskúlanum til kunningar, og høvdu vit hildið, at brævið hevði almennan áhuga, høvdu vit sent tað til fjølmiðlarnar eisini. Tað mettu vit ikki tá og enn minni nú, ið verkfallið er av.

*Vegna Miðvágs-Sandavágs skúla*

**Emmy S. Joensen,**
**skúlastjóri**

**Jákup Egholm,**
**lærararáðsformaður**

## Reingerðarfólk

Vegna barnsburðarfarloyvi verður hervið søkt eftir 2 avloysarum fyri **reingerðingarfólk við Miðvágs/ Sandavágs skúla** at byrja frá 01/08-2001.

Meira fæst at vita um arbeiðið við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Umsóknir skulu vera **Miðvágs kommunu** í hendi seinast hósdagin 14/06-2001.

**Miðvágs kommuna**

## Hús í Kollafirði til sølu

Um hóskandi boð fæst, selja vit hús okkara í Líðini í Kollafirði. Húsini standa í barnavinarligum og veðurgóðum umhvørvi. Tey eru bygd í 1986, eru 116 fermetrar og eru innrættaði soleiðis: køkur, 2 stovur, 3 kømur, baðiverilsi, bryggers og fullur kjallari. Stykkið er 1040 fermetrar. Nýtt tak verður lagt á.

Hevur hetta tykkara áhuga, setið tykkum í samband við okkum á tlf. 421095.

